## Kanada skrivaði søgu

Einki annað land hevur nakrantíð vunnið 14 gullmerki í einari einstakari vetrar-OL kapping. Men tað gjørdi Kanada, tá liðið í gjár vann gull í íshokki. Noreg og Sovjetsamveldið áttu gamla metið. Sovjetsamveldið vann 13 gullheiðursmerki á vetrarleikunum í Innsbruck í Eysturríki 1976, og Noreg vann eisini 13 gullheiðursmerki á vetrarleikunum í Salt Lake City í USA í 2002. Kanada fekk 14 gull, 7 silvur og 5 bronsuheiðursmerki. Týskland fekk 10 gull, 13 silvur og 7 bronsuheiðursmerki. USA fekk 9 gull, 15 silvur og 13 bronsuheiðursmerki. Tað margháttliga er, at tá Kanada var vertur við vetrarleikirnar í Calgary í 1988, og við summarleikirnar í Montreal í 1976 eydnaðist tað teimum ikki at vinna eitt einasta gullmerki. Men sigast má, at tað hevur Kanada væl og virðiliga fingið endurreisn fyri á hesum vetrarleikunum.



## Kanada vann gull í íshokki

Kanada vann 3-2 á USA aftaná tað, sum í íshokki verður nevnt "Sudden Death", longda leiktíð. Jonathan Toews legði Kanada á odda í fyrstu periodu. Í næstu periodu økti Corey Perry til 2-0, og tá sá tað gott út hjá Kanada. Men USA vildi ikki gevast á hondum, og áðrenn onnur perioda var liðin minkaði Ryan Kesler til 2-1. Tað sá út til at gerast málleyst í triðju periodu. Seinastu løtuna satsaði USA alt, tók málverjin út og leyp á við seks útispælarum. Tað loysti seg væl, tí tá 24 sekund vóru eftir av vanligu leiktíðini javnaði Zach Parise til 2-2. Pápi Zach Parise umboðaði annars Kanada á vetrarleikunum í Sapporo í 1972. Í longdu leiktíðini sat Kanada á tí mesta, og tá sjey minuttir vóru farnir gjørdist Sidney Crosby kanadisk tjóðarhetja, tá hann skoraði sigursmálið.

### H71-Neistin 29-35 (11-18):

# Neistin fær fýra venjingar-dystir afturat

**Neistin hevur tryggjað sær pláss í finaluni. Tí eru landskappingardystirnir, sum resta í, bara venjingardystir fyri steypavinnararnar. Í gjár vann liðið í Hoyvík**



uni@sosialurin.fo

Uni Holm Johannesen

Heini Hanusarson staðfesti tað so væl í Kringvarpinum eftir dystin í Hoyvík í gjár. Neistin fer komandi vikurnar at venja fram móti finaluni. Tí er talan eina mest um venjingardystir komandi fýra vikurnar, tá landskappingardystirnir, sum resta í, skulu avgreiðast.

Neistin staðfesti aftur í gjár sína greiðu støðu sum greitt oddalið í Atlantic Airways-kappingini. Á útivølli móti verandi føroyameistarunum vann Neistin við seks málum. Fyrireikingarnar til finaluna eru byrjaðar.

### Djumic stórspælandi

Jugoslav Djumic er besti strikuspælarin í landinum. Tað staðfesti hann aftur í gjár. Djumic ivaðist ongantíð, tá hann hevði møguleikan at senda framvið Jens Skipagøta, sum vardi málið hjá H71. Eftir steðgin gjørdu hoyvíkingar sítt til, at strikuspælarin varð ansaður, men avleiðingin var ein útvísing so at siga hvørjaferð. Einu løtuna stóð so illa til, at Kári Nielsen, venjari, bara hevði tríggjar leikarar á vøllinum.

Heini Hanusarson stóð seg eisini væl. Hann var toppskjútti hjá Neistanum við 10 málum.

### Skrædnaði beinanveg

Neistin legði lunnar undir ein tryggan sigur beinanvegin. H71 hevði stórar trupulleikar í verjustøðu. Gestirnir høvdu lætt spæl, og revsaðu hoyvíkingar fleiri ferðir við skjótálopum. Munurin var sjey mál í steðginum.

Heimaliðið gjørdi eina seinastu roynd at vinna seg aftur í dystin eftir hvíldina. Við einari framrættaðari verju minkaðu teir munin niður í trý mál, men tað skrædnaði skjótt aftur.

Seinasta vikuskifti misti Neistin alt á gólvið móti VÍF, hóast steypavinnararnir vóru á odda við níggju málum í seinna hálvleiki. So hættislig varð støðan ongantíð í gjár.

### Ryggin móti múrinum

H71 elta framvegis kollfirðingar, sum í løtuni eru á finalukós. Komandi vikuskifti vitja hoyvíkingar í Vestmanna, og eydnaðst tað ikki at fáa fult, verður málsetningurin hjá føroyameistarunum at sleppa undan niðurflyting.

Í Neistanum, hinvegin, verður bara bíða eftir finalunum. Liðið venur í fulldrøn í løtuni, so seinastu mistøkini verða rættaði. Tað verður uppgávan hjá Inga Olsen, venjara, komandi vikurnar. At fyrireika hópin. Tíverri veit hann ikki, hvat mótstøðuliðið verður. Og tað verður helst ikki avgjørt fyrr enn á seinasta leikdegi.



Neistin hevur longu vissað sær finaluplássið. Stóra kynstrið komandi vikurnar er at halda fast um motivatiónina hjá liðnum
Mynd: Álvur Haraldsen

### FAKTA UM DYSTIN

**H71 – Neistin 29-35 (11-18)**
**10 min:** 2-5
**20 min:** 5-11
**40 min:** 18-28
**50 min:** 22-28
**Málskjúttar**
**H71:** Esbern Patursson 9, Poul Kjartan Dam 6, Dánjal Torgarð 6(2), Karolis Daynis 5, Bárður Brimvík 1, Rúni Vest Højgaard 1, Janus Sørensen 1
**Neistin:** Heini Hanusarson 10, David Edvardsen 8(2), Sjúrður Thomassen 5, Jugoslav Djumic 4(1), Finnur Hansson 3, Jens Mohr 3, Tróndur Kragesten 2
**Brotskøst:** H71 4, Neistin 3
**Útvísingar:** H71 4 – Neistin 3
**Dómarar:** Hanus Kúrberg & Hans Thomassen

### VB-Neistin 19-27 (8-13):

# Eingin hjálp til VB

**Neistin vildi ikki lata nøkur óvæntað stig frá sær, tá tær vunnu tryggan sigur í Vági**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Eftir vørrin, sum VB gjørdi í Runavík fyri viku síðani, varð annars roknað við, at VB kanska eisini kundi sprutta nakað, nú Neistin kom á vitjan.

Neistin hevur sum so ikki tað stóra at spæla fyri, men hóast hetta, so vístu tær enn einaferð, at tær duga at motivera seg sjálvar.

Spenningurin í dystinum varð sum so longu avgreiddur fyrsta korterið, tá tær bláu lupu avstað. Spælið hjá vertunum hekk ikki serliga væl saman, meðan gestirnir høvdu ferð á frá fyrsta bríksli, og longu í steðginum vóru fimm mál á muni.

Tað var ein munur, sum heimaliðið ongan tíð fekk minkað nakað um. Tvørtur ímóti økti Neistin um leiðsluni fyrstu góðu løtuna eftir steðgin, og við hesum settu tær seg enn fastari á bronsumerkini, sum tær hava ligið til alt kappingarárið.

VB liggur hinvegin enn líka tungt undir niðurflytingarstrikuni. Komandi tveir dystirnir hjá liðnum eru móti VÍF og StÍF, og hesir fara at gera av, um matarlepin komandi hondbóltsár er úr Sunset ella 1. deild.

### FAKTA UM DYSTIN

**VB-Neistin 19-27 (8-13)**
**10 min:** 2-5
**20 min:** 4-7
**40 min:** 13-20
**50 min:** 15-25
**Málskjúttar**
**VB:** Migle Senvityte 6(4), Una Egilsdóttir 5(3), Christina Holm 3, Bára Krosslá 2, Andrea Nielsen 2, Rannvá Johannesen 1
Neistin: Birita Wardum 5, Anja Heinadóttir 5, Unn Kragesteen 5, Lina Andriulyte 4, Jacklin Durhuus 3, Katrin á Neystabø 2, Rakul Augustinussen 1, Rakul Magnussen 1, Unnur Danielsen 1
**Brotskøst:** VB 8
**Útvísingar:** VB 1, Neistin 3
**Dómarar:** Tummas Juul Thomsen & Magnus í Króki